## Óli Poulsen ljóðblandar Høgna



*Óli Poulsen*

Nýggja fløgan hjá Høgna Lisberg er um at verða liðug, og kemur væntandi í handlarnar um miðan november. Fløgan hjá gávuríka sangskrivaranum er nógv seinkað, tá Høgni spældi á AME í apríl, var fløgan næstan liðug, men nú er hon á veg sambært heimasíðuni hogni.com

Ætlanin var, at fløgan skuldi ljóðblandast í Belgia av Luc Van Acker, men hetta samstarv er, eftir øllum at døma, fari fyri skeytið tí á heimasíðu síni, sigur Høgni, at Óli Poulsen ljóðblandar fløguna. Óli Poulsen er royndasti og kendasti føroyski ljóðblandarin, og hevur arbeitt við nógvum ymiskum stórum nøvnum bæði í Danmark, Føroyum og stóra útlandinum.

Nýggja fløgan hjá Høgna "Morning Dew" er onnur fløga hjá fyrrverandi Clickhaze trummuleikaranum. Fyrsta fløgan "Most beautiful things" var á tremur við frálíkum løgum, og nýggju løgini er uppaftur betri, so tað verður sera spennandi at hoyra fløguna.

**nud**

## Maria er aftur einsamøll



Maria Guttesen er ikki longur songkvinnan í danska popp/rokk bólkinum Divided Minds, hetta sigur føroyska songkvinnan í tíðindaskrivi. Maria Guttesen hevur seinastu vikurnar spælt fleiri konsertir sum einstaklingur, og hetta er sambært Mariu ein byrjan til eitt nýtt kapitul í hennara yrkisleið sum einstaklingur á tónleikapallinum.

Á heimasíðuni www.mariaguttesen.dk ber til hvønn mánað at hoyra eitt nýtt lag hjá Mariu. Lagið í november mánað kallast I´m to happy. Hetta er fyrstu ferð at møguleiki er hjá tí breiðu fjøldini at hoyra lagið.

Lagið verður lagt út týsdagin 1. november, so um skjótt verður borið at, ber til at taka lagið fyri oktober mánað, ið kallast Fear of the dark niður av heimasíðuni.

Øll løgini, ið verða løgd út á heimasíðuna eru liveupptøkur, og tað er ókeypis at taka tey niður.

**nud**

## Kvinnukvøld í Vágum

**Tær skulu læra at stramma vøddar í lørum, búkinum og dintlinum. Tær skulu læra um litir og klæðir og tosa um smykkur og ur. Talan er um kvinnukvøld í Vágum 10. november, sum Vága Kunningarstova skipar fyri**

KVINNUKVØLD

Hetta er kvøldið fyri kvinnuna. Jana Thomsen frá Fragd og Fimi, fer at læra kvinnur, hvussu tær kunnu stramma vøddarnar í lørunum, búkinum og dintlinum.

Lydia Petersen, litráðgevi úr Klaksvík, fer at ráðgeva um, hvørjar litir tær klæðir. Eisini kanst tú fáa eina »quicktest« fyri ávísan prís.

Linda Lauritsen frá Ursmiðjuni í Sørvági greiðir frá smykkum og urum, hvat er frammi nú, og hvussu velur tú tað, ið hóskar til tín.

Hárfríðkanarstovan hjá Janitu hevur valt sær fimm kvinnur til modell til »áðrenn og aftaná«. Hvørjar litir og hárstíl velur tú.

– Vit hava valt at fara í Vakstrarhúsið Dáan fyri at fáa eitt meira »eksotiskt« upplivilsi, har borðreitt verður við ostaborði, kaffi/te og køku, verður sagt úr Vágum.

# Yngsti maðurin fór við flestu steypunum

**Seyðasýning var í Vági fríggjakvøldið. Yngsti luttakarin, Jón Arni Hjelm, fór við ikki færri enn trimum steypum**

SEYÐASÝNING

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Jón Arni Hjelm, sum gongur í øðrum flokki, fekk helmingin av steypunum, tá seyðasýning var í Vági fríggjakvøldið (Mynd: D. Olsen)*

Nógv fólk var savnað í kjallaranum í Stóra Pakkhúsi í Vági fríggjakvøldið. Árliga seyðasýningin var á skránni og meðan dómararnir tóku dagar ímillum seyðirnar, stóðu ung sum eldri spent framvið og eygleiddu, høvdu kanska hug at ilskast ella fegnast, so sum tað nú hoyrir til slíkt tiltak. Men alt gekk friðarliga og í besta sóma.

Eftir sjálva sýningina og dømingina, var borðhald í Pakkhúsinum, har dómararnir eisini komu við úrslitinum.

Og yngsti luttakarin slapp at taka ímóti trimum av teimum seks handaðu steypunum. Jón Arni Hjelm, sum gongur í 2. flokki í Vágs Skúla, slapp at taka ímóti trimum steypum. Hann, og abbin, Josef Midjord, hava heiðurin fyri, at seyðurin er so góður, sum hann er.

Jón Arni fekk fyrstu og aðru viðrisløn fyri bestu hagalombini. Fyri uttanbýggja/traðarlamb fekk Juhl Sumberg fyrstu og aðru virðisløn og John Petersen fekk 3. virðisløn.

Eitt ferðasteyp fyri besta hagapart ella besta hagalamb, varð eisini latið og var hetta ein lampa, ið stendur á vøkrum veðrahorni. Eisini her kundi Jón Arni Hjelm errin fara upp at taka ímóti.

Ongir veðrar fingu steyp ella virðisløn, tí ongin var mettur so góður í ár, at hetta kom upp á tal.

Í ár varð nýggja tøknin eisini komin til Vágs og til bar at skanna seyðin fyri feitt. Ikki allir tóku av hesum tilboð, men av teimum umleið 15 seyðunum, sum fingu hesa skanning, var onkur ímillum, ið fekk veruliga góð tøl.

# SMS fyllir 28 ár

**Mikudagin fyllir SMS 28 ár, og tað verður hátíðarhildið alla vikuna**

FØÐINGARDAGUR



*Gentubólkurin PoppKorn*

Mikudagin 2. november fyllir SMS 28 ár, og tað fara tey at hátíðarhalda. Tey byrjaðu longu fríggjadagin og halda fram til leygardagin 5. november – og tá verður eisini opið til kl. 18.

Allar dagarnar verður fjølbroytt og spennandi skrá. Á Torginum fer sjónleikarbólkur við Jákupi Veyhe á odda at framføra tveir ymiskar barnaleikir. Eisini fara Angela og Hannibal at undirhalda, og gentubólkurin PoppKorn fer at hava konsert.

Sjálvan føðingardagin 2. november bjóðar SMS øllum vitjandi kaffi og okkurt søtt afturvið.

Høvuðstiltakið á føðingardagsskránni eru tveir sjónleikir, ið eru settir upp til føðingardagarnar í SMS. Leikirnir eru nýggir, men taka útgangsstøði í tveimum kendum ævintýrum.

Tað er Jákup Veyhe, ið hevur leikstjórnað teimum trimum leikararunum, og vit kunnu vænta okkum okkurt øðrvísi, spennandi og ikki minst stuttligt, siga tey úr SMS.



*Á Torginum fer sjónleikarbólkur við Jákupi Veyhe á odda at framføra tveir ymiskar barnaleikir*



*Angela og Hannibal fara at undirhalda*

# Myndlist í Margarinfabrikkini

MYNDLIST

Spennandi skeið í myndlist verður í Margarinfabrikkini í Havn í november.

Tað er Margarinfabrikkin saman við Mentamáladeildini hjá Tórshavnar Kommunu, ið skipa fyri.

Skeiðið umfatar alt innan myndlist so sum foto, blýantstekningar, akvarel ella tað, ið ein hevur áhuga fyri.

Tað eru Ian Luid og Suffía við Stein, ið fara at undirvísa. Tey undirvístu eitt nú eisini á ungdómsráðstevnuni, ið var í Havn her fyri.

Kunningarfundurin verður 3. november og síðani eru fylgjandi skeiðini 8., 15., 22. og 29. november, øll byrja kl.. 19. Skeiðini eru fyri børn og ung í aldrinum frá 9-18 ár, og tað er ókeypis. Tilmelding á tlf. 302119 og til ber at lesa meira um skeiðið á www.fabrikkin.fo

